## GÍ hevur kært ÍF-dystin

Sunnudagin fyri góðari viku síðani endaði tað 2-2, tá ið ÍF hevði vitjan av GÍ í Formuladysti. Um tað verður, sum GÍ vil, so verður úrslitið ikki standandi. Gøtumenn hava kært til kappingarnevndina hjá FSF, sum teir vilja hava at kolldøma úrslitið og at áseta nýggja grannauppgerð í Fuglafirði. Sambært heimasíðuna hjá ÍF stuðlum hevur FSF heitt á ÍF um at geva sínar viðmerkingar til málið í seinasta lagi týsdagin.

Orsøkin til kæruna er tann, at ÍF í eina løtu hevði tólv spælarar á vøllinum. Tað komst av misskiljing í sambandi við, at Christian Soelberg hjá ÍF var uttanfyri vøllin til viðgerðar. Hendingin var beint undan málinum, sum ÍF skoraði til 2-1, og sambært gøtumonnum vísa videoupptøkur, at Soelberg var framvegis á vøllinum sum tólvti maður, tá ið ÍF skoraði málið. ÍF og dómarin skulu geva sína frágreiðing, áðrenn kappingarnevndin fer at taka støðu.





*Eftir at tað í nógv ár fyri tað mesta hevur verið talan um tap við einum og viðhvørt tveimum málum, og eftir at Føroyar onkra ferðina hava megnað javnleik, er veruleikin knappliga ein heilt annar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Holdið er veikt og viljin er ikki so fúsur

**Eftir tvey 6-0 tap er føroyskur fótbóltur vaknaður upp til veruleika í altjóða høpi, sum tað ivaleyst eru nógvar orsøkir til, og sum tað ikki ber til at sleppa burturúr í einum nú**

LANDSLIÐSKREPPA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fyri aðru ferð í minni enn tríggjar vikur varð fótbóltslandsliðið leygardagin sligið í gólvið við tungum 6-0 tapi.

Eftir at tað í nógv ár fyri tað mesta hevur verið talan um tap við einum og viðhvørt tveimum málum, og eftir at Føroyar onkra ferðina hava megnað javnleik, er veruleikin knappliga ein heilt annar.

Nýggi høvuðsvenjarin og liðið standa brádliga í nýggjum altjóða veruleika, sum er tann, at tjóðirnar, sum vit kappast við og serliga pressan í hesum londunum, heldur, at Føroyar hava einki at gera í altjóða fótbólti. Tað er vorðið sum dómur!

Nýggi venjarin stendur eisini í veruleika í Føroyum, sum eingin venjari hevur verið í, síðani stutt frammanundan, at fyrsti venjarin í 1993 legði frá sær. Fyrrverandi spælarar hava í vikuskiftinum alment givið til kennar, at FSF hevur ikki valt tann rætta venjaran, og nú hevur ein spælari boðað frá, at hansara tíð á landsliðnum er liðug.

### Veruleikin

Einfaltsettuppertrupulleikin, at landsliðið ikki megnar at fáa mál, og at landsliðið ikki megnar at byrgja upp fyri mótstøðuliðunum, sum hava fingið mál burturúr so at siga øllum møguleikunum, sum tey hava havt.

Í tveimum undankappingardystum hava mótstøðuliðini skorað trý mál upp á brotsspark. Fýra mál hava teir skorað eftir innlegg úr síðunum. Í øllum førunum hava tað verið í minsta lagi tvær ferðir so nógvir føroyingar í brotsteiginum frammanfyri Jákupi Mikkelsen, sum tað hava verið útlendingar. Markeringarnar hava verið ov vánaligar, taklingarnar hava ikki verið har, tá ið tær skuldu setast inn, og blokeringarnar hava ikki verið so góðar, sum tað áður er sætt.

Hetta er ein av trupulleikunum í verjuni. Ein annar trupulleiki ella kanska heldur veruleiki er, at málverjin seinastu tveir dystirnar ikki hevur spælt á tí ónátúrliga høga støðinum, sum hann ofta hevur gjørt. Um Jákup hevði havt verið á sama støðinum leygardagin, sum hann var t. d. tá ið Føroyar spældu í Litava og Skotlandi í 1998, so hevði hann vart fyri fleiri av málunum, sum fóru ígjøgnum. Og hevði dómarin verið eitt lítið sindur lagaligari, enn hann var tað leygardagin, so hevði úrslitið havt verið 1-0 ella 2-0 ella kanska 3-0.

Uppaftur ein annar trupulleiki er, at teir, sum áttu at verið berandi kreftirnar nú, ikki eru so stinnir, sum teir áður hava verið. Spælararnir, sum hava flestu landsliðsroyndirnar, vístu uttan undantak ikki tað, sum teir áður hava megnað.

### Framtíðin

Einasta positivi veruleikin eftir Skotlands ferðina er, at Føroyar ikki skulu spæla nú mikudagin, sum annars verður stórur landsdystardagur kring Europa.

Litava, sum megnaði 1-1 á útivølli móti italsku heimsmeistarunum leygardagin, vitjar á Tórsvølli leygardagin 7. oktober. Tað verður risastór uppgáva, og avbjóðingin verður uppaftur størri, tá ið Føroyar nakra dagar seinni skulu til Fraklands!

Eingin ivi er um, at tann veruleikin, at tað eru so fáir útisetar á landsliðnum, sæst aftur í avrikunum. Síðstu vikurnar hava bæði Christian Høgni Jacobsen og Atli Danielsen sagt, at teir ætla sær uttanlands at royna eydnuna. Fyri landsliðið er at vóna, at fleiri fara saman við teimum, og at fleiri fara at megna at arbeiða seg upp. Síðani Jákup Mikkelsen og Todi Jónsson vóru profilar í superliguni hava dømini verið ov mong um spælarar, sum eftir stutta tíð í útlandinum, aftur hava leitað heim á klettarnar.

Heima í Føroyum tykist tað vera torført at finna aðrar betri spælarar, enn teir eru, sum leygardagin vóru í Glasgow. Nú ræður um at fáa pjøssa skútuna, sum meiri ella minni er í havsneyð, saman til nýggjan túr. Tveir teir fyrstu dystirnir í EM undankappingini hava staðfest, at holdið er veikt, og at viljin ikki er so fúsur, sum hann áður hevur verið.

## Skotland-Føroyar 6-0 (5-0)

EM undankappingardystur á Celtic Park stadion í Glasgow leygardagin 2. september 2006 kl. 15
Dómarakvartett úr Russlandi: Igor Egorov, Evgeniy Volnin, Vladislav Khodeev og Alexander Conchar
Áskoðarar: 50.059
1-0: Darren Fletcher 7.
2-0: James McFadden 10.
3-0: Kris Boyd br 24.
4-0: Kenny Miller br 30.
5-0: Kris Boyd 38
6-0: Garry O'Connor 85.
**Skotland:** Craig Gordon, Heart of Midlothian - Christian Dailly, West Ham United, Steven Pressley, Heart of Midlothian, David Weir, Everton, Gary Naysmith, Everton - Darren Fletcher, Manchester United (Gary Teale, Wigan Athletic, 46.), Nigel Quashie, West Bromwich Albion (Scott Severin, Aberdeen, 84.), Paul Hartley, Heart of Midlothian - Kenny Miller, Celtic (Garry O'Connor, Lokomotiva Moskva, 61.), Kris Boyd, Glasgow Rangers, James McFadden, Everton
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: Neil Alexander, Cardiff City, Graham Alexander, Preston North End, Russel Anderson, Aberdeen, Gary Caldwell, Celtic
Gult kort: Darren Fletcher og Kenny Miller
Venjari: Walther Smith
**Føroyar:** Jákup Mikkelsen, 44/-93, B36 - Jákup á Borg, 45/2, HB, Atli Danielsen, 15/0, KÍ, Óli Johannesen, 79/1, liðformaður, TB, Janus M. Joensen, 3/0, HB - Julian Johnsson, 62/4, B68, Pauli G. Hansen, 3/0, Skála, Fróði Benjaminsen, 38/2, B36, Rógvi Jacobsen, 38/6 (Kári Nielsen, 4/0, HB, 84.), (Símun Samuelsen, 5/1, Keflavík, 76.), Jónhard Frederiksberg, 11/0, Skála (Hanus Thorleifsson, 1/0, B36, 60.) - Christian Høgni Jacobsen, 29/2, NSÍ
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: Meinhardt Joensen, 0/0, KÍ, Claus Bech Jørgensen, 10/1, Blackpool, Hans Pauli Samuelsen, 2/0, EB/Streymur, Vagnur Mohr Mortensen, 1/0, HB
Gult kort: Jákup á Borg, Fróði Benjaminsen, Jónhard Frederiksberg og Óli Johannesen
Venjari: Jógvan Martin Olsen
Ikki á dómaraseðlinum men í ferðalagnum: Bárður Olsen 1/0